# Doris, Ragnhild og Kristian vunnu Xplore 2005

**Árliga oljuleitingartiltakið Xplore hevur verið hesa vikuna við 440 luttakarum frá miðnámsskúlum í 7 londum. Ein bólkur á Handilsskúlanum á Kambsdali gjørdist besti føroyski bólkur og vann 5000 kr**

»OLJULEITING«

Føroyska felagið Simprentis hevur aftur í ár skipað fyri oljuleitingartiltakinum Xplore. Endamálið er at geva miðnámsskúlanæmingum eina grundleggjandi fatan av oljuleiting. Hetta verður gjørt í eini simulering á netinum, har luttakandi bólkarnir kappast um at finna olju í rakstrarverdum nøgdum.

Í besta føroyska bólkinum vóru Doris í Garði Joensen, Ragnhild P. Kjærbo og Kristian Kristiansen frá Føroya Handilsskúla á Kambsdali. Hinir føroysku skúlarnir, sum luttóku í ár, vóru Tekniski Skúli í Klaksvík, Føroya Studentaskúli, Føroya Handilsskúli Tórshavn og Miðnámsskúlin í Vági.



*Í besta føroyska bólkinum vóru Doris í Garði Joensen, Ragnhild P. Kjærbo og Kristian Kristiansen frá Føroya Handilsskúla á Kambsdali.*

Vinningar vóru eisini til besta danska bólkin og besta bólkin úr hinum londunum. Besti danski bólkurin var úr Svendborg, meðan besti bólkurin úr hinum londunum var úr Stavanger. Í Stavanger hava tey avgjørt at vinnandi bólkurin sleppur eina ferð til Føroya í apríl 2006.

Ein eykavinningur var eisini latin til ein danskan bólk, sum vann eina tyrluferð út at síggja eini boripall hjá DONG í Norðsjónum.

Simprentis ger simulatiónir til undirvísingarbrúks og brúkar eisini hesar simulatiónir í sambandi við skeið fyri eitt nú oljufeløgum uttanlands. Næsta tiltakið fyri miðnámsskúlum og hægri læristovnum verður Startup 2005, sum er ment saman við Menningarstovuni og har luttakararnir læra at seta egið virki á stovn.

Xplore 2005 sponsorar vóru Mentamálaráðið, Maersk Olie og Gas, DONG og Danmarks Tekniske Universitet. Xplore 2006 verður í døgunum 3. og 4. oktober 2006.

Xplore heimasíðan er á www.xplore2005.com <http://www.xplore2005.com/> . Har sæst ein listi yvir, hvussu allir luttakararnir kláraðu seg í ár.±




" Det er fedt, at du i tre måneder kan koncentrere dig 100% om dit arbejde og så bagefter har tre måneder, hvor du har fri."

*Jonathan, skibsofficersstuderende*

Du er klar til en uddannelse, der udfordrer både dine boglige og tekniske færdigheder. Som hurtigt giver dig muligheden for at prøve kræfter med dit fremtidige job i en af verdens største handelsflåder. Og som kræver, at du kan fastholde det store overblik såvel som fokus på detaljen.

Læs meget mere om uddannelsen og jobbet på **maersk-skibsofficer.dk**, hvor du også kan bestille informationsmateriale og ansøgningsskema samt sende din ansøgning online. Kommer du i betragtning, modtager du herefter indkaldelse til en optagelsesprøve. Du kan også ringe til os på **+45 3398 7000**.

Gør tanke til handling allerede i dag!

**Vi afholder optagelsesprøve den 3. november 2005 i Thorshavn.**

MÆRSK

maersk-skibsofficer.dk

## Ung klaverstjørna úr Hirtshals konsert í Runavík



*Unga Ida Kellerman Thomsen úr Hirtshals fer at hava klaverkonsert í Runavík í sambandi við Mentanarvikuna 23. - 30 oktober*

KLAVERKONSERT

Unga klaverstjørnan, Ida Kellemann Thomsen úr Hirtshals, kemur til Føroya at hava konsert í Mentanarvikuni í Runavíkar kommunu, sum verður í døgunum 23. til 30. oktober.

Konsertin verður í býráðssalinum týrskvøldið 25. oktober kl. 19.30, har Ida Kellemann Thomsen luttekur. Á konsertini luttaka eisini ungir evnaríkir tónleikarar úr Runavíkar kommunu.

Øll eru vælkomin á konsertin, sum er ókeypis.

Luttakararnir á vinnustevnuni Faroexpo, sum verður hildin í somu døgum, fáa eisini høvi at hoyra Idu Kellemann Thomsen á Gallaveitsluni.